# Miðstøðin fyri minnisveik í Havn
## søkir 2 starvsfólk

Miðstøðin fyri minnisveik, er ein royndarverkætlan, sum Alzheimerfelagið hevur tikið stig til. Verkætlanin verður fíggjað av Almannamálaráðnum og Tórshavnar kommunu.

Miðstøðin fevnir m.a. um eitt dagtilhald fyri minnisveik, ráðgeving til persónar við demens og teirra avvarðandi, og um vikuskiftini verður av og á café. Miðstøðin hevur leigað eini vælhóskandi hús til endamálið miðbýnum.

Fyrst verður farið undir dagtilhaldið, har 8 fólk kunnu vera samstundis. Dagtilhaldið er ætlað heimabúgvandi mobildementum persónum í dagtímunum vanligar yrkadagar. Trý fara at starvast í dagtilhaldinum. Miðstøðin fer at leggja seg eftir at arbeiða eftir nýggjastu umsorgarteorium, sum stimbrar tann sjúka psykososialt. Henda uppgávan krevur starvsfólk, sum hava áhuga at arbeiða við minnisveikum fólkum.

**Søkt verður eftir tveimum starvsfólkum** til setan 1. september 2004 ella eftir avtalu. Størvini eru tíðaravmarkaði til 30. juni 2006, samsvarandi játtanini til royndarverkætlanina.

**Førleikakrøv til umsøkjaran:**
- hug og hegni at vera um persónar við demens
- ávísa vitan innan demens, bæði medisinskt og sosialt
- støðugt at vilja dagføra kunnleikan innan demensøkið
- skal vera sjálvstøðugur og kreativur
- góð samstarvsevni
- hava tol og empati

Til størvini krevst útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur, ergoterapeutur, heilsuhjálpari/atstøðingur, pedagogur ella onnur líknandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur at hava eftirútbúgving sum demenssamskipari. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

**Vit bjóða:**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv, har tú fært møguleika frá byrjan, at seta dám á stovnin
- eitt starv har tú ert við til at virka fyri at røkka settu málum
- møguleika fyri menniskjaligari og fakligari menning

Talan er um tvey fulltíðarstørv við arbeiðstíð vanligar yrkadagar í dagtímunum. Niðursett tíð kann møguliga koma uppá tal.

**Setunarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Ernu Háberg, projektleiðara tlf. 228004 ella 316350

Umsóknarfreistin er **fríggjadagin 13. august 2004.**

Skrivlig umsókn saman við viðmælum, royndum og upplýsing um útbúgving v.m. skulu sendast til:

**Alzheimerfelagið**
**Tórsbyrgi 16**
**100 Tórshavn**

# Handilslærlingur

**Søkt verður eftir Handilslærlingi til VHS handilin á Hálsi, at byrja tann 16. august 2004**

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv til tann sum fær læruplássið, har viðkomandi sleppur at royna seg sum vørukeypari, gera tilboð og prýða um handilin. Viðkomandi fær eina breiða vitan um ventilatión, hitaanlegg og sanitet.

**Uppgávurnar fevna m.a. um:**
- Avgreiðslu av kundum
- Telefon avgreiðslu
- Røkt av handlinum
- Bílegging av vøru
- O.a. fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv:**
At tann, sum søkir skal hava lokið FHS ella HH prógv

Send eina skrivliga umsókn til:

**P/F Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8
Postboks 182
110 Tórshavn

Meira fæst at vita við at ringja til Símin ella Áka á telefon 312000

**pf Maria Poulsen & Co.**
FO-100 Tórshavn · tel 312 000

*P/F Maria Poulsen, er størsta HVS virkið í Føroyum, við handli, verkstaði og búnýti. Í dag starvast 35 fólk hjá fyritøkuni*

Sosialurin 341800


**Vegna broytingar í vøruúrvælinum verður goymslan umskipað tessvegna selja vit við STÓRUM AVSLÁTTRI partar av goymsluni**

Talan er um : Máling, tapet, gólvrestir, tundurgólv, smáteppir, máttur, flísar og kina møblar

**RING 316066**
**máling & gólv**
**Fyribils eru vit at hitta á Bóndaheygi 4**

Nakað av goymsluni ætla vit at halda áfram við, og er tí ikki partur av goymslutømingini
- tó fáa tey ið keypa hesar vørur eyka avsláttur um tey keypa av restgoymsluni

**TIL DØMIS:**
**TAPET FYRI 0,- kr**

Sosialurin 341800



**Arbeiðshandskar**
**til øll endamál - bæði á sjógvi og landi**
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
**ADC-Heilsølan** spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo
Sosialurin 311820



Lesið Sosialin

www.sosialurin.fo



*"Kjálkar, lippur, ræstur fiskur, upsastykkir við barbeque-smakki ....fyrsta floks delikatessur!"*

***- fisk til døgurða minst eina ferð um vikuna!***

**www.fiskakeyp.fo**

Á heimasíðu okkara finnur tú eitt stórt úrval av fiski og fiskaúrdráttum til matna. Og har finnur tú eisini døgurðauppskriftina!

Bíleggingarlisti liggur á heimasíðuni. Fyll út og send/faxa til okkara, so hevur tú vøruna við dyrnar 2-3 verkadagar aftaná. Tú kanst eisini ringja ordran inn á tlf. 21 53 35. Skjótt og ómakaleyst.



**Sonni FISKAKEYP**
690 Oyndarfjørdur
Tlf. 21 53 35
Fax 44 52 45

***- tín fiskaveitari á alnótini***





# ÓLAVSØKUTILBOÐ

**VENJING ALLAN AUGUST MÁNAÐ**

**EINANS KR. 99,-**

Tilboðið er galdandi til 6. august, og bert í sambandi við 6 ella 12 mðr. hald (PBS. avtalu)

**Fragd & Fimi**
DJ. í GEILSGØTA 5 · 100 TÓRSHAVN
TEL 317100 · FARTEL 517100

**EFTIR SUMMARFRÍTÍÐINA VERÐA VÍÐKAÐAR UPPLATINGARTÍÐIR**

**SUN CITY**
**KL. 07 - 23 · HVØNN DAG**
**NÝGGJ RØR**




# STJÓRI TIL NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM

Starvið sum stjóri fyri Norðurlandahúsið í Føroyum er leyst at søkja til setan 1. februar 2005.

Norðurlandahúsið í Føroyum er eitt norðurlendskt mentanarhús, ið breiðir út norðurlendska mentan til Føroya, føroyska mentan til Norðurlond, og sum stuðlar og fremur føroyskt mentanar- og listalív. Norðurlandahúsið liggur í Tórshavn, og virksemið verður fíggjað av Norðurlendska ráðharraráðnum og Føroya landsstýri.

Norðurlandahúsið er ógvuliga virkið. Tað virkar breitt og fevnir um øll lista- og mentanarøki. Árligi fíggjarkarmurin er umleið 16 milliónir krónur, og starvsfólkatalið er umleið 17 ársverk.

Starvið sum stjóri fyri Norðurlandahúsið er avmarkað til fýra ár við møguleika fyri at leingja. Søkt verður eftir einum virknum og skapandi stjóra, sum hevur nøgvan kunnleika til norðurlendska list og mentan í breiðastu merking umframt fyrisiting og fíggjarviðurskifti. Stjórin skal virka eftir nútímans leiðsluháttum. Umsøkjarar við skili fyri fyrisiting og leiðsluroyndum hava fyrimun. Harafturat verður stórur dentur lagdur á skapandi hugsanarhátt, góð samráðingarevni og evnini at samskifta og skapa sambond.

Løn- og setanarviðurskiftini eru sambært reglugerðini hjá Norðurlendska ráðharraráðnum.

Umsókn á hægst tvær A4 síður umframt skjøl og viðmæli skal sendast til Norðurlandahúsið í Føroyum, Norðari Ringvegur, Postboks 1260, FO-110 Tórshavn innan 20. august 2004.

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Tel 317900 · Fax +319790**
**E-mail: nlh@nlh.fo; http://www.nlh.fo**




# Hátrýstvaskarin!



**Kring landið**
Vit hava ognað okkum ein hástr stvaskara við trýsti, ið er 500 bar. Tá ið tað snýr seg um at reinsa bygningar, húsagrundir, tøk, tún, gólv og annað tílíkt, loysir tað seg at lata júst hendan sterka hástrýstvaskaran loysa uppgávuna. Tað ger heldur ikki mun, hvar í landinum arbeiðið skal gerast. Hann er lættur at flyta.



**Við veggin**
Vanliga hástr stvask okkara við 500 bars trýsti og heitum ella køldum vatni megnar alla reingerð. Vanlig óhumska, gróður og leys máling fúka av sum einki. Er málingin føst, verður sandur eisini nýttur. Tá loysnar øll máling lættliga. Verður farið at loysa størri veikleikar í pussa um betongi, verður sama viðgerð nýtt.



**Á takinum**
Tá ið tøk verða vaskað, nýta vit serligan takreinsara. Trygdin er í hásæti, og framleiðararnir hava eisini tryggjað, at eingin vandi er á ferð, tá ið asbesttøk verða vaskað. Serstøk verja er á takreinsaranum. Hon tryggjar, at takið verður vaskað væl og virðiliga, hóast tað ikki spruttar. Vatnið rennur niður í takrennuna.

**Ring 42 31 11**

**SANDBLÁSING**

Spf. Sandblásing · 466 Ljósá · Fartel 22 15 22 · Telefaks 42 34 32 · sandblas@post.olivant.fo


TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Tjarnargarður**

Tjarnargarður letur eftir ætlan upp í september 2004.

Á Tjarnargarði eru 10 røktarheimspláss og 12 dagstovnapláss fyri heimabúgvandi fólk, sum eru minnisveik. Seinri í ár fer virksemið eisini at umfata eina ergo- og fysioterapideild

Endamálið við Tjarnargarði er at geva fólki úr Tórshavnar kommunu, sum hava tørv á røkt alt samdøgrið eitt heim, har tey fáa røkt, og fjálgað verður um tey. Eisini er endamál stovnsins í dagtímunum at veita umlætting til heimabúgvandi minnisveik.

www.torshavn.fo

## Starvsfólk til Tjarnargarð

Tórshavnar kommuna søkir vegna Tjarnargarð eftir
- sjúkrarøktarfrøðingum
- heilsurøktarum
- heilsuhjálparum

**Eisini verður søkt eftir**
- reingerðarfólkum

**Førleikakrøv:**
- hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktafrøðingur, almanna- og heilsurøktari ella heilsuhjálpari
- hevur góð samstarvsevni
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkunum
- er nýhugsandi og hevur hug og áræði at skipa fyri dagliga virkseminum hjá búfólkunum
- til dagdeildina fyri minnisveik er ynskiligt, at umsøkjari hevur eftirútbúgving sum demenssamskipari

**Vit kunnu bjóða**
eitt áhugavert starvsumhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og verða við til at menna umsorgan og røkt

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála hjá avvarandi yrkisfelag

**Meir fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Hensiu Einarsson, fyristøðufólk ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara tlf. 302010

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsing um útbugving og royndir skal verða Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn í hendi innan fríggjadagin **20 august 2004**